gult cyan magenta svart



# Gevandi at fyrireika ólavsøkuprædikuna

*Viðareiðsprestur sigur, at tíðarskeiðið, hann brúkti til at fyrireika prædikuna, hann helt í dómkirkjuni ólavsøkudag, var ein gevandi og spennandi tíð*



*Viðareiðisprestur prædikaði á ólavsøku um hveitikornið, sum doyr fyri at geva lív*
*Mynd: Jens K. Vang*

Edvard Joensen

Hann hevði alla tíðina í huganum at halda seg til prædikutekstin og royna at fáa hann út, soleiðis at fólk hoyrdu og skiltu tað, prædikað varð. Og tí málinum metir Meinhard Bjartalíð, prestur á Viðareiði, seg at hava rokkið.

Meinhard Bjartalið sigur, at tíðin, hann arbeiddi við ólavsøkuprædikuni, fyri mesta er farin við at finna ta røttu beinagrindina, sum sjálv prædikan síðan skuldi skrivast uttaná.

Tað er soleiðis, sigur prestur, at hann byrjaði at arbeiða upp á prædikuna tíðliga í juli mánað. Hann las prædikutekstin, og sum við hveitikorninum í tekstinum, slapp tað lisna orðið so at búnast og bera frukt.

Hann gekk so og hugsaði um tað, lisið var, og um hvussu hann kundi leggja tað út soleiðis, at fólk skiltu, hvat hann segði.

### Føroysk viðurskifti

Meinhard Bjartalíð sigur, at hann valdi at vinkla prædikuna upp á føroysk viðurskifti. Og fyri at tey skuldu vera so heimlig sum gjørligt, valdi hann kenda umhvørvið á Viðareiði sum útgangsstøði. Kristian Osvald Viderø og Christian Matras áttu góðan part av íblástrinum.

Tað er hesin parturin av forarbeiðinum, sum tekur ta nógvu tíðina. Tá alt er gjøgnumarbeitt nakrar ferðir og liggur greitt í høvdinum, er eingin søk soleiðis at skriva tað niður. Og soleiðis gekk eisini hesaferð.

Prædikueksturin var, sum sagt, um hveitikornið, sum Johannes evangelistur skrivar um í 12. kapitli, har Jesus greiðir frá, hvussu hveitikornið fellur í jørðina og doyr fyri síðan at bera ávøkst.

Meinhard Bjartalíð, prestur, flutti hesa myndina yvir á føroysk viðurskifti. Núlivandi føroyingar kenna helst betri til, hvussu eplið verður sett niður og tikið uppaftur, enn teir kenna til kornvelting.

Men prestur fór víðari í síni útlegging av hesum at fara í moldina og doyggja fyri at skapa møguleikar fyri áhaldandi lívi.

Hann vísti á, at eisini menniskjað livir víðari av teimum, sum undan eru farin. Fedrarnir, sum lagdir eru í moldina, liva kortini víðari við okkum, sum nú eina løtu ganga omaná. Prestur segði soleiðis:

*»Tað er av sonnum vísdómur í hveitikorninum. Hendan vísdóm lýsir Heðin Brú meistarliga í „Fedranna talu“:*

„Grein honum lutir, ið ættin kosti til stavnhald: Lívføri títt er slektin, tey, sum í mold liggja. Komu tey stutt ella longur, tú skalt víðari byggja. Lívlát er ikki deyðin. Lívlát er hetta at seta førningin frá sær við vegin. Tað, sum frá fedrunum goymdist, og sum tú sjálvur søkti, meðan tú førkaði fótin. Sonurin tekur aftur viðføri títt at bera longur fram á vegin.«

### Eingin revsiprædika

Tað er hvørja ferð við spenningi, fólk seta seg at lurta eftir prædikuni, prestur heldur, tá myndugleikin er komin í kirkju ólavsøkudag. Mong munnu bíða eftir, hvussu harðliga prestur fer at revsa politikararnar, fyri eitt og annað, teir nú hava gjørt í tíðini, farin er, síðan teir vóru til ólavsøkuguðstænastu seinast.

Men viðareiðisprestur sigur, at tað var ongantíð í hansara tonkum at fara at halda nakra revsiprædiku. Hann ætlaði frá fyrsta degi at halda seg til dagins tekst, og tað gjørdi hann so.

Meinhard Bjartalíð sigur, at tað er umráðandi at halda teg til tað, tú ætlar at siga, og ikki sveima ov nógv um ymiskt evni. Tí ert tú ikki neyvur í tíni prædiku, kemur hon ikki longri enn til kantin á prædikustólinum. Og so nyttar hon einki. Tað vil siga, eingin hoyrir hana.

Men tað er ikki bara sjálvan prædikutekstin, prestur skal hugsa um, meðan hann fyrireikar seg til eina prædiku.

Hann skal eisini velja kollektir, bønir og sálmar. Ikki minst sálmarnir eru týdningarmiklir í einihvørjari guðstænastu. Tí her eru øll við og luttaka aktivt í guðstænastuni. Og tað er nógv lættari at luttaka, tá tú ert við í onkrum, tú kennir, enn um tað er tær fremmant.

Meinhard Bjartalíð sigur, at hann var hugtikin av sálmasanginum og urguleikinum í dómkirkjuni á ólavsøku. Hann var góður, sigur prestur uttan at gera ov nógv av.

Viðareiðis prestur er líkasum á heimavølli, tá tosað verður um sang og tónleik. Kanska serliga kirkjuligan. Hann er kendur um landið alt sum bæði urguleikari og kórleiðari. Og hann gav sálmasanginum tað skoðsmál, at hann var lívgandi og hátíðarligur. Ikki minst Tórshavnar Manskóri og dómorganistinum, Oddvør Johansen, fyri at takka.

Prestur sigur, at tað er altíð við ávísum spenningi, at farið verður á prædikustólin. Soleiðis var sjálvandi eisini á ólavsøku, hóast hann ikki hevði fleiri summarfuglar í búkinum, enn hann onkuntíð fyrr hevur havt. Hann sigur, at tað var tó mest, áðrenn alt byrjaði, at hann kendi spenningin. Tá hann var komin í kirkju, gekk tað bara av sær sjálvum.

Meinhard Bjartalíð greiðir frá, at hann hevur fingið fleiri viðmerkingar um prædikuna. Frá starvsfeløgum, politikarum og fólki, hann møtti í Havnargøtum, tá hann seinni ólavsøkudag, sum so mong onnur á ólavsøku, var og spákaði við familjuni.

Allar hava tær verið positivar, fegnast Meinhard Bjartalíð, prestur á Viðareiði, um.



*Mynd: Jens K. Vang*

gult cyan magenta svart



# Ólavsøkugesturin fær ov lítið fyri pengarnar

*viðskiftafólkini verða ikki sett í hásæti*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Úti í heimi, niðri á meginlandinum er tað ein heil vinna, at skipa fyri býarstevnum og høvuðsendamálið hjá teimum sum skipa fyri er sjálvsagt fyrst og fremst at vinna pening. Men eitt annað aðalmál er eisini, at tann, sum vitjar teirra tiltøk fær eitt gott upplivilsi burturúr, so gott, at hann tímir aftur komandi ár. Júst hetta tykist tann parturin av ólavsøkuni, sum tekur sær av at selja á gøtuni at hava gloymt ella kanska ongantíd at hava lært.

Tú fær snøgt sagt ov lítið fyri pengarnar. Gekk og lurtaði og hoyrdi somu ónøgdina fleiri staðni. Tað er harmiligt at síggja øll hesi eldhugaðu ungfólk, sum púra ókeypis arbeiða fyri teirra feløg, at tey ikki eisini kunnu bjóða viðskiftafólkunum nakað fyri peningin. Tað er ikki teirra skuld.

### Kennir teg útnýttaðan

Ongin ivi er um, at Tivoli er tað heilt stóra hjá børnunum á Ólavsøku og foreldur vita, at á Ólavsøku, so er alt dýrt. Í summum av sølubúðunum er skipað fyri soleiðis, at børn um ikki annað fáa eina lítla premiu, ein lítlan bommpakka, eina karamellu ella okkurt annað, royna tey okkurt og ikki vinna. Hesar sølubúðir fáa eisini gott ummæli frá børnunum, tær hava givið hesum eitt gott upplivilsi.

Men tað er ikki stuttligt, tá ein sær børn kanska fyri tíggindu ferð keypa sær 12 skot við luftbyrsuni fyri 40 krónur og ikki fáa nakað sum helst burtur úr. Vinningarnir eru so ússaligir, ein plastrósa, ella ein hálvnakin dama frá sekstiárunum og byrsurnar eru so skeivar og veikar, at tað er rár hending, at nøkur rósa fellir til jarðar, tíans heldur nøkur hálvnakin dama.

Sjálvandi skulu fyrireikararnir fáa nakað burturúr, men tað ger heldur einki um viðskiftafólkini eisini aftaná kunnu siga, hetta vóru nøkur deilig tiltøk vit vóru við til. Vit fingu eisini nakað burturúr. Soleiðis var eisini til tey flestu tiltøkini, men tá tað kemur til sølubúðirnar, so fáa tær flestu botnkarakter.

Pylsur vóru seldar um alla Havnina. Ein franskur hotdog kostaði 25 krónur. Eg ivist onga løtu í, at fólk gleðiliga høvdu latið 35 krónur fyri ein ordiliga pylsu, gjørda úr fyrstaflokks tilfari, heldur enn hesar útvatnaðu, bleiku, líklittu við ongum smakki, sum vórðu seldar á Ólavsøku.

### Bara pengar onki annað

Um Ólavsøkuna vóru nógv fólk, sum leitaðu sær niðan til Posthúsið uppi á Hálsi fyri at royna antin go-cartirnar ella crosssúklurnar. eitt gott hugskot, sum Ellisakfør skipaði fyri. Men eisini her fór peningagreðin framum at viðskiftafólkini skuldu fáa nakað gott burturúr.

Eg var sjálvur við 11 ára gamla soninum har uppi Ólavsøkudag Hann stillaði seg gramman í bíðirøðina. Vit roknaðu okkum fram til at tað fór at taka eina tíma til hann slapp at royna crosssúkluna. Hann stóð ein heilan tíma í bíðirøðini og so varð hon knappliga broytt, so hann kom at standa aftast aftur.

Vit góvu upp hendan dagin og spurdu ein av fyrireikarunum um opið eisini var sunnudagin. »Jú,« svaraði hann avgjørdur. »Vit hava opið í morgin frá klokkan tvey til átta.« Vit møttu aftur sunnudagin í góðari tíð eitt sindur áðrenn klokkan tvey. Onnur høvdu fingið sama hugskot og nøkur vóru møtt nógv fyrr. Vit vóru eini 40 fólk, sum bíðaðu í frísak lotinum.

Klokkan slerdi tvey og ongin kom fram, hon gjørdist fimm minuttir yvir, tíggju minuttir yvir, korter yvir, tjúgu minuttir yvir, klokkan fimm minuttir í hálvgum kom ein av fyrireikarunum og fór spakuliga at gera alt til reiðar. Sonur mín slapp at koyra nakað yvir klokkan trý, sunnudagin, tá hevði hann nýtt næstan tríggjar tímar samanlagt í bíðirøð. Hann koyrdi fyri 100 krónur og tað er rímuligt peningaliga sæð. Men fyrireikingin var vánalig. Ein gyrðing var rundan um har tey koyrdu, hvat gekk fyri seg uttanfyri gyrðingina høvdu fyrireikararnir ongan áhuga fyri, tað einasta í galt var at fáa pengarnar. Tvær bíðirøðir vóru uttanfyri og fólk máttu skipa seg sjálvan eftir hvør var sterkastur fyri at sleppa framat.

Hugskotið til tiltakið hjá Ellisakførum er frálíkt. Tað kann gerast nógv betri komandi ár uttan at kosta fyrireikarunum eyka, við at teir leiga fleiri súklur, gera banarnar meira áhugaverdar og skipa fyri eisini uttanfyri so skil er í bíðirøðunum







*Kári Müller nú hotelstjóri í Skagen*

# Kári Müller hotelstjóri

*Fyrrverandi klútahandlarin úr Havn er nú aðalstjóri og nevndarformaður á Hotel Skagen*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Er tú góður handilsmaður, so kann tað næstan gera tað sama hvat tú selir, tú dugir handverkið og kann selja næstan alt. Hetta hava 460 partaeigarar í Hotel Skagen Strand funnið út av. Tey hava valt fyrrverandi handilsmannin í SMS, Kára Müller til nevndarformann í hotellinum og tað seinasta er, at hann nú eisini mannar stjórasessin.

– Eg kenni hetta sum eitt ordans herðaklapp, aftan á at eg riggaði av í Føroyum og byrjaði heilt á berum her í Skagen, sigur ein fegin Kári Muller.

– Hotel Skagen Strand er eitt av teim bestu hotellunum í Danmark og sum nevndarformaður og stjóri, sum umsiti eg eitt virði upp á eina knappa milliard. Tað er ein spennandi avbjóðing. Vit føroyingar kunnu formáa okkum nakað, eisini í útlandinum, sigur Kári Müller.

– Eg eri ein partaeigari í Hotel Skagen Strand av 460, og eg eri einasti føroyingur. Og sum einasti føroyingur, samstundis sum føroyingar stríðast fyri at fáa fullveldi, so verið eg valdur sum nevndarformaður og síðan sum stjóri. Tað er stuttligt, sigur Kári Müller.